# MASKINMEISTARI til Vágsverkið

SEV

Eitt starv sum maskinmeistari við elverkini í Suðuroy er leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið umfatar rakstur og hald av elverkunum í Suðuroy, bæði sum dagarbeiði og vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Elverkini í Suðuroy umfata í løtuni:

- Elverkið í Vági við trimum dieselmotorum tilsamans 9,7 MW. Hesir motorar eru riknir við tungolju
- Elverkið í Botni, sum er eitt vatnorkuverk við tveimum turbinum upp á tilsamans 3 MW
- Elverkið í Trongisvági, sum ikki koyrir dagliga, men er til at taka, við einum dieselmotori upp á 2 MW.

Vakthavandi maskinmeistari hevur yvirvaking av og lastfordeiling millum Vágsverkið og elverkið í Botni umframt netyvirvaking og koblingsleiðslu fyri elnetið í allari Suðuroynni.

Uppmøtingarstaðið er á Vágsverkinum, har vaktin hevur tilhald. Arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaði til hini elverkini eftir tørvi, og fer flutningur vanliga fram við arbeiðsbili hjá SEV.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv, 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv og royndir innan økið.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá prógvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Palla Mortensen, verkmeistara, ella til Anders Nedergaard-Hansen, deildarleiðara fyri framleiðsluna, báðir á tel. 346800.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum verða sendar til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
FO-110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi hósdagin 3. juli 2008.

*SEV er grundað á eina samhaldsfasta, fólkaræðisliga skipan, har tann vinningur, sum fæst burtur úr elsøluni, verður í høvuðsheitum nýttur til framtíðar útbyggingar av framleiðslueindum og elkervinum. Á tann hátt verður vinningurin øllum Føroya fólki at gagni, og útbyggingar kunnu fara fram, so hvørt samfelagið mennist, og streymtørvurin økist.*

*SEV hevur eina veitingarskyldu, sum áleggur felagnum at veita øllum borgarum, virkjum, stovnum o.s.fr. støðugan streym alt samdøgrið. SEV hevur sostatt bæði góðsku- og kervisábyrgdina í Føroyum.*

*Starvsfólk hjá SEV verða útbúgvin og førleikament sambært galdandi reglum á økinum og krøvum, ið SEV setir til trygd og annað. Vitanin verður áhaldandi viðlíkahildin við bæði innanhýsis undirvísing og skeiðum og eftirútbúgvingum annars.*



STARVSLÝSING

# Hevur tú altíð droymt um at byggja?

So fært tú nú møguleikan at royna hetta í verki. Hevur tú hug at arbeiða við nýbygging, umbygging og viðlíkahaldi av almennum bygningum, so kunnu vit bjóða tær øðrvísi royndir í einum spennandi og avbjóðandi starvi á bygningadeildini hjá Landsverki.

Vit leita eftir einum virkisfýsnum og skapandi persóni við byggikønari bakgrund at byrja hjá okkum skjótast til ber.

**Høvuðsarbeiðsøkið**
Saman við einum vælvirkandi toymi og starvsfeløgum við drúgvum royndum fert tú at vera við í arbeiðinum at greina og raðfesta krøvini til viðlíkahald og bygging av almennum bygningum við atliti at funktionaliteti, estetikki og góðsku. Eisini skalt tú góðkenna verkætlanir og taka støðu til møguligar broytingar.

Harumframt skalt tú eisini taka lut í viðgerð av øðrum málum, har bygging og bygningar, landslag og formlist eru partar av viðgerðini.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir fólki við byggikønari bakgrund – t.e. við útbúgving sum arkitektur, verkfrøðingur ella byggifrøðingur. Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og vænta vit tí, at tú ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður.

Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og gevur títt íkast til at menna arbeiðsplássið.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til:
Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. juli. Merk umsóknina „Umsókn til bygningadeildina“ og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Oyvind Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella ob@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*



Sosialurin
www.sosialurin.fo